# kufestivalur



”Hvønn dag”, sum uttan iva teljast ímillum hansara bestu løg, og eisini kom lív í áskoðararnar, tá hesi løgini vórðu spæld. Men av álvara kom lív í, tá løg sum ”Dupultsong” og ”Dansa” vórðu spæld. Við sær hevði hann eitt gott orkestur, sum var mannað av Rógva á Rógvi, Arnoldi Ludvig, Pæturi við Keldu og Leivi Thomsen. Hendan framførslan telist uttan iva millum tær bestu leygarkvøldið, og í mongum hugaheimum; tann besta.

## Easy living

Síðan átti gamla Uriah Heep-stjørnan tørn. John Lawton kom vælupplagdur á pallin og saman við Deiggj høvdu teir eina feita framførslu. Hóast vit ungu ikki kenna serliga nógv til Uriah Heep, so vóru fólk í øllum aldursbólkum til konsertina. Lagið var sera gott á áskoðarunum og ikki minni gott á John Lawton. Hann dugdi væl at framføra, og saman við Deiggj sang hann tey góðu og gomlu Uriah Heep-løgini. Serliga løg sum ”Easy Living” og ”Free me”, fingu rættiligt lív í áskoðarafjøldina, og flestu okkara kundu hugsað okkum at staðið og lurta longri, tá konsertin kom at enda.

Aftaná kom Jack Petersen á pallin at lesa yrkingar, og eisini nógv fólk vóru samlaði á festivaløkinum tá. Ímillum allar framførslurnar sang Terji Rasmussen inni á Pubbini, og tað riggaði sera væl.

Alt í alt var Jóansøkufestivalurin sera væleydnaður, og saman við tónleikarunum fingu áskoðararnar eina uppliving við mongum ymiskum sløgum av tónleiki. Tíðarætlanin var hildin, og ongantíð bíðaðu vit leingi eftir, at tónleikararnir skuldu byrja. Veðrið var sum sagt av tí fagrasta, eitt lítið lot, men ikki kalt. Álítandi keldur siga, at um túsund fólk vóru samlaði leygarkvøldið á festivaløkinum, sum var á keiini á Tvøroyri.



*Tað var ordiliga skeg at síggja, hvussu nógva orku Side Effect leggur í hvørt lag,*

*Mynd: Ólavur Frederiksen, FaroePhoto.com*



*Crawling Blue setti av álvara sín dám á festivalin við sínum blues-løgum*

*Mynd: Ólavur Frederiksen, FaroePhoto.com*

### Fríði Jensen um John Lawton og Deiggj:




- Eg eri Uriah Heep fjeppari, teir hava bestsellarar, sum siga nógv. Tekstirnir hava altíð sagt mær nakað, t.d. Wise Man. Teir eru góður og spennandi. John Lawton er ein góður sangari, og eg má rósa Deiggj fyri, hvussu gott teir spæla, og Dennis Lave syngur eisini gott.

### Lilian Dam um Eyðun Nolsøe:

- Dámi so væl Eyðun, tí hann er so orginalur, hann hevur sín egna stíl. Eg var til konsert hjá honum, tá hann frumframførdi nýggju plátuna. Deilig konsert, bæði upphitarin Rókur Jákupson og Eyðun Nolsøe. Um man kennir Eyðun áðrenn, so er tað sami stílurin, hansara egni stílur, so hvis man dámar tað, so er tað, tað”.

### Jákup á Dul Sørensen og Zakarias Mullet um Eyðun Nolsøe:

Eyðun - øgiliga gott. Jóansøkufestivalurin samlar allir suðringar. Øll eru saman her og hava tað gott her á Jóansøkufestivalinum. Stuttligt at hoyra teir góðu gamlu sangirnir, man hevur hoyrt, tá man fer í býin. Allir teir sangir vit synga og duga uttanat og eisini at hoyra nýggjar góður sangir.

### Gudmund Larsen um John Lawton og Deiggj:

- John Lawton er heimsins besti sangari. Sangirnir, Falling angel, Free me - fantastiskt. Eg havi uppliva Uriah Heep konsert í Føroyum fyri nøkrum árum síðani á Kamsdali, men hetta er fyrstu ferð eg havi hoyrt John Lawton í Føroyum. John Lawton er absolut heimsin besti sangari”.

### Birita í Dali um festivalin:

- Je fekk at vita kvart yvir átta, at Side Effect spældi kl. 20.00. Jóansøkufestivalsskráin hevur bara verið at sæð á netinum, tað er ikki nóg mikið. Keðiligt, at Side Effect spældu so tíðliga, tá teir eru so góðir at fáa stemning í. Tí skuldu teir ligið seinni, tá meira fólk var. Tí teir fáa fólk upp at hoppa.